# Tingmaður hjálpti til

**Karsten Hansen hjálpti til í bjargingararbeiðinum, tá ódnin rakti Summar Festivalin. Royndi bjarginarfelagslimurin metir tað vera eitt undur, at eingin kom álvarsliga til skaðis**



*Karsten Hansen gav sær ikki stundir at fara heim at skifta, men fór undir bjargingina í stásklæðum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

SUMMAR FESTIVALUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Millum tey, ið hjálptu til við bjargingini á Summar Festivalinum, tá stóra mat- og skeinkiteltið og minna teltið við búffasøluni hjá Hotel Norð fóru í eini hvirlu, var Karsten Hansen løgtingslimur fyri Miðflokkin.

Eg varð ringdur upp av dóttrini. Tað eru hon og maður hennara, ið hava búffasøluna. Eg var júst tá staddur í 85 ára føðingardegi, men fór beinanvegin avstað. Føðingardagurin var á Gerðum, og eg búgvi í Vikunum, so hóast eg var í góðum klæðum, metti eg meg ikki hava stundir at fara heim at skifta, sigur Karsten, ið var á staðnum longu áðrenn limirnir í Bjarginarfelagnum.

### Eitt undur

- Har var øgiliga kaotiskt. Eg haldi, at tað er eitt undur, at eingin fekk álvarsligan skaða. Eitt nú fór stórar jarntunnur á flog og kundu rakt onkran, sigur Karsten, ið sjálvur hevur verið limur í bjargingarfelagnum síðan 1975 og ofta hevur verið við í bjargingum. Hann vísir á, at lítla teltið við búffasøluni inntil hósmorgunin stóð frammanfyri hitt størra teltið, men at tað hevði verið nakað ábært, so tí varð tað flutt. Hevði teltið staðið fyri, tá telt og tunnur fóru á flog, kundi vannlukka staðist av tí.



*Kristian Blak er sum altíð høvuðsmaður í Yggdrasil*

# Yggdrasil við estlendskum solisti

**Hóskvøldið verður Yggdrasil at hoyra í Miðlahúsinm, sum vant er solistur boðin við, hesaferð er solisturin Veronika Portsmuth**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

27 ára gamla Veronika er útbúgvin klassikur sangari og orkesturleiðari úr Estlandi. Veronika hevur verið í Føroyum seinastu tvær vikurnar við eini starvsløn fyri fýra vikur at seta seg inn í tónleikaumhvørvið her og at knýta enn fleiri mentanarbond millum Føroyar og Estland.

Yggdrasil fer at spæla løg saman við Veroniku, hetta eru estisk fólkaløg og løg, sum Veronika hevur smíða, meðan hon hevur verið í Føroyum.

Tað eru Tutl og Havnar Jazzfelag Konsertin, ið skipa fyri konsertini í Miðlahúsinum hóskvøldið kl 20.00 og kostar kr. 80 kr. Limir í Havnar Jazzfelag gjalda kr. 50

Yggdrasil hevur sum vanligt Kristian Blak í manningini, hesaferð spæla umframt Kristian, Konni Kass á saksofon, Mikael Blak á bassi og Brandur Jacobsen á trummum.

Tjarnargarður

*Nýggi parturin av Tjarnargarði verður væntandi liðugur í september. Tá fer Tjarnargarður at kunna hýsa 34 búfólkum. Í løtuni er talið 10.*

*Tjarnargarður verður býttur í tríggjar eindir. Í tveimum eindum verða 12 búfólk. Tann gamli parturin, sum hýsir 10 búfólkum, verður gjørdur til eina eind fyri búfólk við Alzheimer/demens.*

*Vit arbeiða eftir hugsjónini »The Eden alternative«, har tørvurin hjá búfólkunum er avgerandi fyri, hvussu arbeiðslagið skal skipast. Tað krevur, at starvsfólk arbeiða eftir øðrvísi hugburði enn vanligt hevur verið, tá arbeitt hevur verið við føstum rutinum. Vit hava djór, plantur og barnavitjanir, so heimið gerst eitt livandi stað til gleði fyri búfólk, avvarðandi og nærumhvørvið.*

*Ynskiligt er, at starvsfólkini eisini hava áhuga fyri ítrivi og tiltøkum, so tey saman við búfólkum og avvarðandi skapa trivnað í heiminum, so her verður gott at vera.*

*Arbeitt verður tvørfakligt, og dentur verður lagdur á persónligar og fakligar eginleikar.*

# Starvsfólk til Tjarnargarð

**Søkt verður eftir**
- deildarleiðara
- varadeildarleiðara
- sjúkrarøktarfrøðingum
- heilsurøktarum
- heilsuhjálparum

**Eisini verður søkt eftir**
- fólki til reingerð og vaskarí
- fólki til matgerð (evt. kokkur) við ábyrgd fyri vøruinnkeypi o.ø.

**Førleikakrøv:**

**Umsøkjarin skal hava:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari ella heilsuhjálpari
- áhuga og/ella eftirútbúgving í demens
- góð samstarvsevni
- gott yvirlit og megna at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkunum

**Vit bjóða:**
Eitt vinarligt arbeiðsumhvørvi, har øll kunnu gera sína ávirkan galdandi, og atlit verða tikin til umstøðurnar hjá hvørjum einstøkum, um tað er gjørligt.

**Setanarviðurskifti:**
Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Hensiu Einarsson, leiðara, ella Helenu Poulsen, varaleiðara, á tel. 302075.

**Umsókn**
saman við prógvi, CV og møguligum ummælum, skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. august 2007.

DIMMALÆTTING